tíðindablaðið sosialurin

FRÆLSI – JAVNAÐUR – BRØÐRALAG

67. ÁRGANGUR

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Muller
Fyritøksstjóri: Kristjan Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Blaðfólk: Randi Jacobsen - Dagny Joensen - Tórfinn Smith - Hilmar Jan Hansen - Justinus Eidesgaard

Útgevari: P/f Sosialurin
Uppseting: P/f Sosialurin
Prent: P/f Pressan 1981

Bústaður: Argjavegi 26 Argjum
Telefon: 11820

Postadr: Postsmoga 76 110 Tórshavn
Telefax: 14720

# Harðar treytir

**TAÐ** eru harðar treytir, danir fara at seta føroyingum, tá næsta samráðingarumfar verður tann 17. august í ár, um tíðindini um upplegg dana annars eru eftirfarandi. Tíðindini gera tað lítið hugaligt at fara út í Tinganes og mangir hava longu fingið kaldar føtur. Serstakliga er hetta galdandi hjá teimum, sum í valstríðnum hava látist, sum samráðingarnar við danir bert er eitt spæl. Fyri formann sambandsfloksins tykjast samráðingarnar vera ein lítið týðandi hending. Vit fara bert niður og siga, at nú hava vit gjørt okkara – nú mugu tit taka um endan. Hetta er av sonnum eitt margháttligt upplegg frá komandi løgmanni. Í valstríðnum hava hann og flokkur hansara júkað upp í saman og trúttað niður í føroyingar, at einki er gjørt og tað sindrið, sum er gjørt er gjørt skeivt. Nú eina góða viku eftir valið sigur hann, at vit hava gjørt tað, ið gerast kann, nú mugu danir um rest. Hetta er nýggir tónar! Tónalagið hjá øðrum hevur borið á sama borðið. Vit siga bara við danir sum í sjónleikinum: »Vit eiga ikki eitt oyra – vit gjalda ikki eitt oyra«.

**TEIR** kenna danir illa, sum nú bjóða seg fram. Sambandsmenn halda enn sum í 1906, at danski statskassin er ein sjálvtøkufyritøka, har ein bara fer og tekur tað ein skal brúka og forsætismálaráðið er ein gávubúð. Danir gjalda – danir orðna okkara trupulleikar, tað hevur verið sambandssjabbið meira enn áttati ár. Og aðrir í valstríðnum vóru lítið mætari enn sambandsmenn. Men soleiðis var ikki í 1906 og soleiðis er tað slettis ikki í 1994. Danir lata ikki við dyrnar – tað hava teir fyri alt tað aldri gjørt. Tað er bert ein gamal útslitin sambandsdreymur, at danir vilja gjalda fyri okkum og at danir skulu greiða alt fyri okkum. Men soleiðis fullu orðini og maka til uppgávulyndi, sum tað komandi sambandsløgmaðurin legði fyri dagin herfyri í sjónvarpinum, skal ein leita leingi eftir. Tað var beinleiðis ein ynk at hoyra: Nei, vit vita eingi ráð – nú mugu danir taka um endan. Hetta undraði nú ikki okkum, men mangur, sum hevur sett sítt álit á sambandið, mundi odna um skallan.

**EITT** annað er so tað, at danir seta alt ov harðar treytir og hesum treytum eigir einki landsstýri at finna seg í. Danir eiga at fáa at vita, at politikkur teirra mótvegis Føroyum er vandamikil fyri føroyska búskapin og at hesin politikkur ikki bøtir um støðuna, men ger hana uppaftur verri. Hetta eiga danir at fáa at vita, men harfrá og so at gráta um, at nú mugu danir loysa okkara trupulleikar, er eitt langt lop. Tað tykist, sum um føroyingar framvegis hava ein forkláringartrupulleika mótvegis dønum. Danir hava framvegis ikki skilt til fulnar, hvat tað er, sum hendir her og komandi landsstýrið má og skal megna at greiða dønum frá støðuni, so danir koma niður aftur á jørðina. Danir mugu fáast burtur frá tí revsimentaliteti, ið hevur eyðkent støðu teirra til føroysku kreppuna. Vit mugu burtur frá hesum evindaliga danska jabbinum um, at vit skulu bøta fyri okkara marglæti í áttatiárunum. Tað leiðir ikki til nakað gott og tað eitrar viðurskiftini millum báðar tjóðirnar. Alt hetta leggur stóra ábyrgd á komandi samráðingarleiðararnar, men tað uppgávulyndi og tann gamli sambandsandin, sum nú heilt aftur hevur yvirtikið sambandsflokkin, boða ikki frá góðum í so máta.

**Sosialurin**

## VALUTAKURSIR

| | | 18.07.94 | Ultimo síðsta mán. |
|---|---|---|---|
| USA | Dollari | 606,40 | 638,50 |
| Bretland | Pund | 948,71 | 971,48 |
| Týskland | Markur | 393,26 | 391,50 |
| Svøríki | Króna | 78,90 | 80,95 |
| Noreg | Króna | 89,80 | 90,16 |
| Frakland | Frankur | 114,58 | 114,72 |
| Belgia | Frankur | 19,080 | 19,031 |
| Sveits | Frankur | 466,28 | 486,23 |
| Holland | Gyllin | 350,64 | 349,67 |
| Italia | Liri | 0,3928 | 0,4009 |
| Finnland | Markur | 118,61 | 116,43 |
| Ísland | Króna | 8,96 | 9,09 |
| Eysturríki | Skillingur | 55,889 | 55,652 |
| Spania | Pesetas | 4,759 | 4,748 |
| Portugal | Escudos | 3,818 | 3,772 |
| Kanada | Dollari | 440,22 | 459,12 |
| Japan | Yen | 6,1777 | 6,2051 |
| Írland | Pund | 937,49 | 951,68 |
| Grikkaland | Drakmur | 2,600 | 2,586 |
| | XEU | 750 66 | 753,75 |

Kelda: Føroya Sparikassi

## Tvangsauktion

På Dommerkontoret, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, afholdes

**Torsdag den 4. aug. 1994, kl. 14.20**

tvangsauktion, (AS 207/94) over matr. nr. 702 b, Klaksvík, tilhørende P/F Ognarfelagið.

Auktionen er begæret af advokat Petur Even Djurhuus, Bryggjubakki 22, tlf. 1.1260 (j. nr. 48/1989) på vegne en pant- og udlægshaver.

Ejendommen er en erhvervsbygning på en 783 kvm. stor grund. Det bebyggede areal udgør 694 kvm. i 2 etager.

Ejendommen kan beses efter aftale med ovennævnte advokat.

Auktionsdokumenterne ligger til gennemsyn på dommerkontoret.

**Færøernes fogedret,** *den 15.07.94*
**Henrik Engell Rhod**
**dfm.**

## BRIDGEHÚSIÐ

## RESTORFFS-BRIDGEKAPPING

Ólavsøkukappingin, sum hon nevndist seinasta ár, hevur fingið navnabroyting, nú Restorffs bryggjarí stuðlar kappingini.

Kappingin verður tann 31/7 kl. 14.00
Eins og seinasta ár verða problemspøl.
1. vinningur 300 kr. í part.
2. vinningur 200 kr. í part
spurtvinningur.
Tekning seinast tann 27/7 á tlf. 12274 (Johannes) 15039 (Carl) 14192 (Heðin) 18721 (Bridgehúsið).

Kostnaður 50 kr.

**SUMMARKAPPINGIN**
Hvønn sunnudag kl. 14.00 er opið hús har øll kunnu vera við. Bestu 10 í summarkappingini eru hesi.

| | |
|---|---|
| 1. Carl Mikkelsen | 136 |
| 2. Arne Mikkelsen | 90 |
| 3. Johannes Skárup | 75 |
| 4. Zakarias Joensen | 42 |
| Salomon Johansen | 42 |
| 6. Arnbjørn Sivertsen | 40 |
| 7. Hans J. Petersen | 38 |
| 8. Allan D. Christiansen | 37 |
| 9. Niels Nielsen | 34 |
| Trygvi Vestergaard | 34 |

## Bátaakslar

úr rustfríum, sýruføstum stáli, sis 2324, góðkent til bátaakslar, verða gjørdir bíliga.

**Tlf. 17942, Kaldbak**

## Blindastovnur Føroya

**hevur opið mándag–fríggjadag kl. 9–16.**
**Telefonir: 18222 og 19208.**